Tíðindablaðið
sosialurin
Internet: www.sosialurin.fo

**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov

**Marknaðardeild:** Jonhard Hammer, Dagbjørt S. Hansen
**Blaðfólk:** Áki Bertholdsen, Turið Kjølbro, Dánjal Højgaard, Dagfinn Olsen, John Johannessen, Sveinur Tróndarson, Eyðun Klakstein, Høgni Mohr
**Ítróttur:** Jákup Mørk

**Myndamenn:** Jens Kristian Vang, Álvur Haraldsen
**Útgevari, uppseting:** Sp/f Sosialurin
**Bústaður:** Argjavegur 26, Argir

**Postadr:** Postsmoga 76, 110 Tórshavn
**Telefon:** 311820
**Telefax.** 314720
**e-mail:** post@sosialurin.fo
**Lýsingar:** lysing@sosialurin.fo
**Prent:** Sosialurin

# Aftur galið

## *Oddagrein*

Nú var aftur rok um eitt mál, ið sorterar undir Finnboga Arge og Vinnumálastýrinum. Tað er løgið, at rumbul er um nærum øll mál, ið koma haðani og sigur hettar ikki so lítið um handfaringarevnini ella diplomatiska snildið. Tað er sjálvsagt ikki smávegis, at Føroya Handverksmeistarafelag noktaði limum sínum at taka upp arbeiði í samband við Vágatunnilin, men tað mest áhugaverda í hesum málinum er ikki, um tað er Byggitek ella J & K Petersen, ið fær uppgávuna at gera veg báðu megin við undirsjóvartunnilin. Hesi bæði feløg eru ivaleyst bæði dugnalig og nærløgd í sínum arbeiði.

Tað áhugaverda í hesum málinum er, at Landsstýrið við Fólkaflokkinum á odda og Tjóðveldisflokkinum sum stuðuli hava tikið leiðsluna av arbeiðnum at gera undirsjóvartunnilin um Vestmannasund frá Landsverkfrøðingsstovninum við sínum meira enn 50 ára royndum og latið uppgávuna í hendi á einum nýstovnaðum almennum partafelag, sum so traðkar skeivt longu í fyrsta feti. Útbjóðingar hava verið gerandiskostur hjá Landsverkfrøðinginum í nógv ár, og Løgtingið fekk so sum eina neyðloysn Landsverkfrøðingin við inn í undirsjóvartunnilsverkætlanina sum ráðgevandi instans. Nú síggja vit hvussu nógv tað er vert, og hettar eigur serliga Tjóðveldisflokkurin og formaðurin í Vinnunevndini at leggja sær í geyma.

Hvussu ætlar Finnbogi Arge at borgarin og vinnan skal fáa álit á einum nýstovnaðum partafelag við nærum ongum starvsfólkum, ið megnar tað heilt ótrúliga at verða boykottað av føroyskari byggivinnu longu í sínari fyrstu útbjóðing? Meira týdningarmikið er eisini, hvussu FA ætlar at endurstovna álit á eitt stýri undir hansara leiðslu, har fakkunnleiki verður skúgvaður til viks ella sendur til hús, meðan tað, ið átti at verið rutinumál, verða fløkjur vegna tí, ið líkist væntandi rutinu og ójavnvág millum royndir og ambitiónsstøði.

Ansast má eftir, at avvarandi landsstýrismaður ikki skákar sær undan ábyrgd tí at P/F Vágatunnilin er eitt partafelag. Landsstýrismaðurin hevur sjálvur valt at gera tað soleiðis, men má ikki gloyma, at tað er landið og føroyski skattgjaldarin, sum letur undirsjóvartunnilin gera. Verða siðvenjur í føroyskari byggivinnu brotnar og misálit skapt í samband við eitt slíkt projekt, so eigur landsstýrismaðurin at vera uppgávuna vaksin og taka neyðug stig.

Andstøðan hevur nevnt møguleikan at koyra nevndina í P/F Vágatunnilinum frá, men spurningurin er, um Løgtingið ikki bara burdi avtikið P/F Vágatunnilin og latið Landsverkfrøðingin staðið fyri arbeiðnum — enn er ikki ov seint, og LV megnar ivaleyst eina útbjóðing uttan at verða fyribils boykottaðir av Handverksmeistarafelagnum.

*Sosialurin*

## Viðmerking:

# Flóttafólk sum politiskt jarnbrot

**Viðmerking frá Javnaðarflokkinum**
Í samband við, at landsstýrið hevur læst støðuna fasta viðvíkjandi serbisku flóttafólkunum, hevur Javnaðarflokkurin hesa viðmerking:

Mannagongdin, tá útlendingar søkja um arbeiðs- og uppihaldsloyvi í Føroyum er , at Udlændingestyrelsen biður landsstýrið um viðmerkingar í málinum. Hóast danskir myndugleikar hava formligu ábyrgdina, so hevur siðvenja higartil verið, at teir ganga føroyskum áhugamálum á møti. Tað vil siga, at leikluturin hjá Udlændingestyrelsen í praksis er av formellum slag, meðan landsstýrisins støðutakan hevur verið tann avgerandi fyri endaliga avgerðina.

Landsstýrið hevur givið óteljandi tilsøgnir uttan stórvegis háva. Tað hevur ikki staðið á at avgreiða líknandi mál, tá okkum tørvaði arbeiðsmegi eitt nú í 80'unum. Somuleiðis tá fótbóltsleikarar koma henda vegin.

At talan er um flóttafólk, sum søkja um arbeiðs- og uppihaldsloyvi, átti ikki at broytt ta siðvenju, sum hevur verið galdandi.

Hví vit fáa trupulleikar júst av hesum aktuella máli kann antin skyldast tørvandi politiskum vilja at hýsa hesum fólkum ella eitt høvi hjá landsstýrinum at skapa eina óneyðuga konflikt millum føroyskar og danskar myndugleikar. V. ø o. brúkar landsstýrið á sera ódámligan hátt 19 ólukkuligar lagnir í politiskum talvi við danir.

Arbeiðsmarknaðarmál vóru yvirtikin í 1948, meðan ongi ynski hava verið frammi um at yvirtaka útlendingalóggávuna. Hóast tað hevur hetta ikki verið nakar trupulleiki fyrr enn nú. Hetta kann ikki skírast sum annað enn grov politisk kynisma, sum má átalast. Við hesum roynir landsstýrið at skerja okkara sjálvsstýri og avgerðarrætt við at leita upp forðingar, heldur enn at finna loysnir.

Javnaðarflokkurin heitir á landsstýrið um at avgreiða málið á skjótasta og sømiligasta hátt.

**Tórshavn hin 8. juni 2000**
**Føroya Javnaðarflokkur**

# Alt eftir bókini

Í grein á internet Sosialinum tann 9. juni verður støða javnaðarfloksins til málið um serbisk flóttafólk í Føroyum viðgjørt. Ì greinini er ein røð av misskiljingum og skeivum pástandum, og hetta er sera harmiligt fyri viðgerðina av einum tílikum týdningarmiklum máli.

Millum annað verður landsstýrið lagt undir at hava viðgjørt hetta málið øðrvísi enn onnur mál. Og landsstýrið verður lagt undir at hava roynt at fingið politiskt rumbul um málið og at renna undan ábyrgd. Alt hetta er beinleiðis ósatt, og tí verður her greitt frá gongdini í málinum.

**Vanligt mál um arbeiðs- og uppihaldsloyvi**
Málið snýr seg um arbeiðs- og uppihaldsloyvi fyri tvær familjur við kroatiskum ríkisborgararætti. Fólkini eru í løtuni í Danmark sum flóttafólk, men hava fingið at vita, at tey verða send aftur til Kroatia, tí at kríggið í gamla Jugoslavia er liðugt. Síðani hava tey søkt um arbeiðs- og uppihaldsloyvi í Føroyum, tí her hava tey fingið tilsøgn um arbeiði og bústað. Sostatt søkja tey ikki um at koma til Føroya sum flóttafólk, men søkja eftir júst somu treytum, sum ríkisborgarar úr øðrum londum, ið søkja um arbeiðs- og uppihaldsloyvi Í Føroyum.. Tildømis póllendingar, skotar ella italiumenn, sum arbeiða sum fótbóltsvenjarar, á skipasmiðjum ella sum granska ella lesa í Føroyum.

Umsóknirnar hjá teimum umrøddu flóttafólkunum eru viðgjørdar á júst sama hátt, sum hjá øllum øðrum, ið søkja.

**Vanlig málsgongd**
Útlendingalóggáva og umsiting av uppihalds- og arbeiðsloyvum til Føroya er eitt danskt málsøki burturav, og málsgongdin er rættiliga drúgfør:

Udlændingestyrelsen í Keypmannahavn sendir málini til fútan. Síðani hava mál um arbeiðsloyvi í mong ár verið send Vinnumálastýrinum til viðmerkingar um arbeiðsmarknaðarstøðuna. Og síðani 1. januar 1999 hava mál um uppihaldsloyvi eisini verið send løgdeildini í landsstýrinum til viðmerkingar um løgfrøðisligar spurningar. Málini fara so aftur til fútan, sum síðani sendir tað aftur til Udlændingestyrelsen, ið so skal avgreiða málið.

Øll henda málsviðgerð fer fram á embætismannastigi eftir reglum og mannagongdum sambært lógini. Allar viðmerkingar eru av tekniskum slag. Slík mál hava ongantíð verið viðgjørd politiskt, og tað má heldur ikki henda í nøkrum rættarsamfelag. Tí so høvdu tað verið tilvildarligar avgerðir — alt eftir hvør politikari sat við tí - ið kundi sett rættartrygdina hjá umsøkjarunum til viks.

Eitt slíkt mál var júst Tamilamálið í Danmark, sum jú endaði í eini ríkisrættarsak móti ráðharranum, Ninn-Hansen, tí hann hevði tikið avgerðir móti lógini.

**Politiskt rumbul**
Málið um teir kroatisku ríkisborgararnar hevur verið eitt sera heitt politiskt evni í donskum fjølmiðlum í fleiri ár. Helst er tað tí, at so nógv rok hevur staðist av tí nú. Eftir at málið varð avgreitt úr Føroyum uttan trupulleikar, kom málið knappliga aftur til landsstýrið, har biðið varð um eina politiska tilsøgn frá landsstýrinum um, hvørt loyvini skuldu játtast ella ikki. Hetta er ongantíð hent áður. Landsstýrið svaraði sjálvsagt, at tað einasta rætta er, at málini verða avgreidd sambært vanligari mannagongd við atliti til rættartrygdina hjá umsøkjarunum. Tað vil siga, at avgerðin skal takast eftir, um tey uppfylla treytirnar í lógini og reglunum um arbeiðs- og uppihaldsloyvi til Føroya.

Landsstýrið hevur avgreitt málið eftir bókini. Hvørki Vinnumálastýrið ella Løgdeildin høvdu nakrar viðmerkingar til málini. Landsstýrið hevur sostatt als ikki gjørt hetta til politiskt rumbulsmál yvirhøvur. Tí er tað sera harmiligt, at javnaðarflokkurin nú brúkar hetta málið til partapolitiskt rumbul móti landsstýrinum. Tað er somuleiðis ómetaliga løgið, at javnaðarflokkurin ikki í staðin setir spurnartekin við, at Udlændingestyrelsen brýtur allar vanligar reglur og biður um eina politiska viðgerð í landsstýrinum av lagnuni hjá nøkrum einstøkum familjum. Tað hevði tildømis verið sera áhugavert at spurt altjóða mannarættindarserfrøðingar um hesa mannagongd.

**Høgni Hoydal**



## Meira tilfar á internetinum

*Tilfar, ið rúmd ikki er fyri í blaðnum, kann nú lesast á internetinum*

Av tí at okkum er sent sera nógv tilfar seinastu tíðina, hava vit havt stórar trupulleikar at fáa alt tilfarið við í blaðið.

Fyri at bøta eitt sindur um hetta, hava vit lagt stóran part av hesum út á internetið - á heimasíðu okkara,

**www.sosialurin.fo**

Hetta tilfar kemur við í prentaða blaðið, so hvørt rúm er fyri tí.

Vónandi bera lesarar okkara yvir við okkum.

**blaðstj.**

**Lesið eisini Sosialin á Internetinum**

**www.sosialurin.fo**



# Klaksvíksprestarnir fara ikki til hátíðargudstænastuna

*Niels Pauli Danielsen og Hans Eiler Hammer ætla sær ikki til hátíðargudstænastuna, sum verður í Dómkirkjuni hvítusunnudag*

EYÐUN KLAKSTEIN

Tá stóra hátíðargudstænastan verður í Dómkirkjuni í Havn sunnudagin, verður tað uttan báðar klaksvíksprestarnar.

Teir siga seg báðir verða upptiknar av øðrum kirkjuarbeiði hendan dagin, og tí liggur tað ikki fyri hjá teimum at verða við til gudstænastuna í sambandi við 1000 ára haldið fyri kristniboðanina í Føroyum.

Allir prestarnir í Føroyum eru bodnir við til hesa gudstænastuna, umframt at Margretha drotning og Heindrikur prinsur eisini verða til staðar. Teir donsku bisparnir, sum eru í Føroyum um hvítusunnuna, verða sjálvsagt eisini til gudstænastuna.

**Upptikin í Kunoy**
Niels Pauli Danielsen og Hans Eiler Hammer hava saman við tveimum øðrum føroyskum prestum noktað donskum bispum at prædika í teirra kirkju, og nú donsku bisparnir og flest allir av føroysku prestunum verða til hátíðargudstænastuna í Dómkirkjuni, verða teir báðir ikki við.

– Eg eri upptikin í kirkjuni í Konoy hendan dagin, sigur Niels Pauli Danielsen, sum ikki vil gera fleiri viðmerkingar til hetta.

– Fólk kunnu leggja tað, tey vilja, í hetta, men tað er ein gudstænasta í Kunoy, sum forðar fyri at eg kann verða til gudstænastuna í Dómkirkjuni hvítusunnudag, sigur hann.

Hin presturin í Klaksvík, Hans Eiler Hammer, sigur, at hann skal hava barnadóp í Christianskirkjuni hvítusunnudag.

– Eg havi lovað at havt hendan barnadópin fyri rúmari tíð síðani, og foreldrini vilja fegin hava hann hvítusunnudag. Tí veri eg ikki við í Dómkirkjuni, sigur hann.

**Skal av landinum**
Hans Eiler Hammer sigur, at tað skal als ikki skiljast sum nakað mótmæli, at hann ikki verður við til hátíðargudstænastuna.

– Innbjóðingin til hátíðargudstænastuna kom so seint, at tá hevði eg longu lovað at hava barnadópin, og tað lyftið ætli eg mær at halda. Harafturat skal eg av landinum í feriu mánadagin, og tí liggur tað sera illa fyri at verða í Havn hvítusunnudag, sigur hann.

Niels Pauli Danielsen vil ikki siga, um hansara frávera skal skiljast sum eitt mótmælti. Hann sigur bara, at hann er upptikin í Kunoy hendan dagin.

– Hóast vit eru ósamdir í summum málum, so havi eg framvegis samskifti við bisp, og eg plagi altíð at fara til slíkar gudstænastur. Hesa ferð liggur tað bara ikki fyri, og tað skal als ikki skiljast sum nakað mótmæli, sigur Hans Eiler Hammer.

– Ein líknandi gudstænasta sum hendan er Ólavsøkugudstænastan, og hana fari eg sjálvandi til, sigur hann.

**Restin fer**
Saman við Niels Paula Danielsen og Hans Eiler Hammer noktaðu eisini Bergur Debes Joensen og Sverri Steinhólm donsku bispunum at prædika í teirra kirkju. Bæði Bergur og Sverri ætla sær tó til hátíðargudstænastuna hvítusunnudag.

Og tað ætla flest allir av føroysku prestunum eisini. Vit royndu at fáa at vita av Bispaskrivstovuni, um nakar annar prestur hevur givið avboð til gudstænastuna í Dómkirkjuni, men hetta eydnaðist okkum ikki, tí bispur var á fundi í gjár.

Tað verður Hans Jacob Joensen, bispur, sum fer at prædika á hátíðargudstænastuni. Bjarni Bæk, dómpróstur, og Sonja Klein, sóknarprestur, fara at taka ímóti, tá teir nógvu gestirnir – føroyskir og útlendskir – koma í Dómkirkjuna hvítusunnudag.

Hátíðargudstænastan verður klokkan 11.00, og bæði Sjónvarp Føroya og Útvarp Føroya fara at senda beinleiðis frá hátíðarligu gudstænastuni. Sjónvarpsrásir í øðrum norðurlondum hava eisini sýnt áhuga fyri gudstænastuni.



*– Eg eri upptikin í kirkjuni í Konoy hendan dagin. Fólk kunnu leggja tað, tey vilja, í hetta, men tað er ein gudstænasta í Kunoy, sum forðar fyri at eg kann verða til gudstænastuna í Dómkirkjuni hvítusunnudag, sigur Niels Pauli Danielsen*

# Landsverkfrøðingurin stendur fast við sítt

*– Vit hava hildið okkum til lógina og hava mælt til at Byggitek skal hava arbeiðið at gera vegirnar til Vágatunnilin. Og tað halda vit fast um, sigur Hans Biskupstø, Landsverkfrøðingur*

ÁKI BERTHOLDSEN

Landsverkfrøðingurin heldur framvegis, at Byggitek eigur at fáa arbeiðið at gera vegirnar í sambandi við tunnilin undir Vestmannasundi.

Sostatt hevur útrokningin hjá P/F Vágatunlinum um at tilboðið hjá J&K Petersen, sum loysir seg best sum heild, onga ávirkan á støðuna hjá Landsverkfrøingin.

Í sambandi við vegirnar, skuldi Landsverkfrøðingurin gera eitt tilmæli um, hvør skuldi fáa arbeiðið.

Hann mælti til, at Byggitek fekk arbeiðið, tí tað hevði lægsta tilboð.

Men hesum tók nevndin fyri P/F Vágatunnilin ikki eftirtektar, men gjørdi ístaðin av at taka samráðingar upp við J&K Petersen, sum hevði næstlægsta tilboð um at gera arbeiðið.

P/F Vágatunnilin sigur, at samanumtikið gagnar tilboðið hjá J&K Petersen Vágatunlinum best og tað er eisini bíligast, tá ið ymsar framrokningar verða gjørdar.

Hans Biskopstø, Landsverkfrøingur, sigur, at hann stendu við tað tilmælið, sum hann hevur givið og at útrokningarnar hjá P/F Vágatunlinum hava ikki fingið hann at broyta støðu.

–Vit hava kannað tilboðini og vit hava síðani gjørt eitt tilmæli útfrá teimum forskriftum, sum lisitatiónslógin sigur, og tað tilmælið standa vit við.

– Og vit hava 50 ára royndir í slíkum arbeiði, leggur hann afturat.

*Sigur tú við hesum, at tað, sum P/F Vágatunnilin hevur gjørt, ikki er í samsvari við lisitatiónslógina*

– Tað havi eg onga viðmerking til í løtuni. Eg kann bara siga, at vit hava gjørt eitt tilmæli eftir forskriftunum í lisitatiónslógini og tað tilmælið standa vit fast við.

– Nú eru samráðingar ímillum partarnar og í løtuni hvi eg ikki hug til at leggja meg út í ymsar tulkingar av lisitatiónslógini.

Nevndin í P/F Vágatunlinum hevur gjørt eina uppstilling, sum vísir, hví tilboðið hjá J&K Petersen gagnar byggiætlanini best útfrá eini heildarmeting.

Eitt nú sigur Vágatunnilin, at J&K Petersen hevði eitt sjálvstøðugt, fast tilboð og tí skal onki leggjast afturat fyri møguligari meiri nøgdir, sum verða at flyta.

Hinvegin hevur nevndin í P/F Vágatunlinum lagt 5% afturat tilboðnum hjá Byggitek fyri at leggja upp fyri, at tað verður meiri tilfar at flyta, enn mett var.

Hetta er ein grundgeving fyri at tilboðið hjá J&K Petersen samanumtikið er betri en tað hjá Byggitek.

*Byggikøn hava sagt okkum, at slíka uppstilling ber ikki til at gera eftir lisitatiónslógini?*

–Tað er nokk rætt. Tað er eisini okkara fatan, tí hava vit vit gjørt okkara tilmæli, sum vit gjørdu.

Hann sigur eisini, at hann kennir onki til, at J&K Petersen høvdu eitt fast boð, sum skuldi givið teimum fyrimun framum Byggitek.

Hann sigur, at hann vónar, at samráðingrnar, sum nú eru, fara at føra til eitt úrslit, sum ger byggivinnuna nøgda og sum førir við sær, at farast kann undir arbeiðið í sátt og semju.

Hann sigur, at uppgávan hjá Landsverkfrøðinginum er at tryggja, at arbeiðið verður útint samsvarandi teimum teknisku krøvum, sum eru. Og tað ætla vit at gera, sama hvør ger arbeiðið, sigur Hans Biskopstø.

Bilpakkar 2000 summarið
www.smyril-line.fo
SMYRIL LINE
Tel 34 59 00
team · 31 65 11

4 fólk í bili

Danmark
Fráf. Tórshavn 1/9, 8/9
Fráf. Hanstholm 10/6, 17/6, 19/8, 26/8, 2/9
Ferðist bíliga, Tórshavn-Hanstholm ella hinvegin
úr 775,- fyri hvønn

Noreg
Ferðist bíliga, Tórshavn-Bergen ella hinvegin
úr 480,- fyri hvønn

Hetland
Ferðist bíliga, Tórshavn-Lerwick ella hinvegin
úr 385,- fyri hvønn

Ísland
Fráf. Tórshavn 14/6, 21/6, 9/8, 16/8, 23/8, 30/8
Fráf. Seyðisfjørður 15/6, 22/6, 24/8, 31/8, 7/9
Ferðist bíliga, Tórshavn-Seyðisfjørður ella hinvegin
úr 728,- fyri hvønn

Skotland
Ferðist bíliga, Tórshavn-Hetland-Skotland ella hinvegin
úr 1.273,- fyri hvønn

e-mail: booking@smyril-line.fo